# LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 14. mars 2008
J.Nr.: 200700100
(at tilskila í svari)

Viðgjørt:

**Álit**
viðvíkjandi avgerð hjá Løgmansskrivstovuni um lutvísa noktan av almennum innliti í skjøl viðvíkjandi sendistovu Føroya í Reykjavík

Umboðsmaðurin hevur áður viðgjørt eina klagu frá A um hetta sama málið, sí mál nr. 200700058. Tá mælti umboðsmaðurin Løgmansskrivstovuni til at venda sær til klagaran fyri at vita, um hann framvegis var áhugaður í málinum, og um so var, at taka innlitsumbønina uppaftur til viðgerðar.

Eftir at Løgmansskrivstovan hevur viðgjørt innlitsumbønina av nýggjum, hevur A við teldubrævi, dagfest 16. nov. 2007, sent umboðsmanninum soljóðandi klagu:

> ”Viðvíkjandi avgerðini hjá Løgtingsins umboðsmanni um mína kæru um alment innlit frá Løgmansskrivstovuni.
>
> Løgtingsins umboðsmaður heitti á Løgmansskrivstovuna at taka málið uppaftur, tí málviðgerðin ikki var nøktandi. Tað hevur Løgmansskrivstovan gjørt.
>
> Eg fái nú innlit í ein part av málinum, men ikki í øll skjølini, sum eg bað um. Av tí at eg onga vissu havi fyri, at málsviðgerðin nú er nøktandi, fari eg enn einaferð at heita á Løgtingsins umboðsmann um at kanna eftir, um eg átti at fingið innlit í írestandi skjølini.
>
> Mínar grundgevingar eru tær somu. Eg viðhefti eisini teldubrævið og avgerðina hjá Løgmansskrivstovuni.
>
> Eg kann leggja afturat, at tað eiga ikki at liggja politisk motiv til grund fyri at nokta einum borgara ella journalisti innlit. Atlit eiga einans at vera saklig og byggja á objektiv kriteriir. Mín áskoðan er, at borgarin eigur at hava møguleika at fylgja við í, hvat avgerðir, niðurstøður ella úrslit byggja á.
>
> Við vón um, at Løgtingsins umboðsmaður kann taka málið upp sum skjótast.”

## Málsgongd

Tann 6. nov. 2007, sama dag sum Løgmansskrivstovan hevði móttikið álit umboðsmansins við áheitan um at venda sær til klagaran, sendi Løgmansskrivstovan klagaranum soljóðandi teldubræv:

> ”Víst verður til, at Løgtingsins umboðsmaður hevur latið okkum sína niðurstøðu í málinum um innlit í skjøl viðvíkjandi sendistovu Føroya í Reykjavík.

TRAÐAGØTA 43 • POSTSMOGA 2008 • 165 ARGIR
TELEFON 35 85 00 • TELEFAX 35 85 01 • E-MAIL: LUM@LUM.FO

Sum eisini tær kunnugt, heldur umboðsmaðurin, at okkara viðgerð av málinum var ikki nøktandi. Hann mælir tí Løgmansskrivstovuni til at venda sær til tín sum klagara fyri at vita, um tú framvegis hevur áhuga í umrødda máli.

Við hesum verður tú tí biðin um at upplýsa okkum, um tú hevur áhuga í, at vit taka umbøn tína uppaftur til viðgerðar."

Við teldubrævi 8. nov. 2007 hevur klagarin svarað Løgmansskrivstovuni soleiðis:

"Eg vil fegin hava, at tit taka umbønina uppaftur um alment innlit. Umbønin fevnir um somu skjøl."

Við teldubrævi 14. nov. 2007 hevur Løgmansskrivstovan svarað innlitsumbønini soleiðis:

"Løgmansskrivstovan hevur nú viðgjørt áheitan tína um innlit í skjøl viðvíkjandi sendistovu Føroya í Íslandi av nýggjum við støði í niðurstøðu løgtingsumboðsmansins í sama máli.

Hjáløgd eru umbidnu skjølini, ið innlit verður latið í, nevniliga nr. 8, 10, 12, 13, 15 og 16. Innlit verður ikki latið í skjølini nr. 6, 7, 9, 11 og 14, av tí at tey eru innanhýsisskjøl sambært § 7 í lógini um innlit, og mett verður ikki, at hesi skjøl eru fevnd av ásetingini í § 8. Heldur ikki verður mett, at skjølini innihalda upplýsingar, ið eru fevndar av § 11."

Við teldubrævi sama dag hevur klagarin sent Løgmansskrivstovuni soljóðandi fráboðan:

"Av tí, at eg ongan møguleika havi at meta um, hvørt hasi skjølini eru fevnd av almennum innliti ella ikki, sendi eg hendan teldupost víðari til Løgtingsins umboðsmann, so hann kann meta um, hvørt tit enn einaferð snúgva tykkum undan lógini um alment innlit."

**Partshoyring**

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 20. nov. 2007, varð klagan send Løgmansskrivstovuni til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar, eins og biðið varð um skjølini í málinum.

Við skrivi, dagfest 28. nov. 2007, hevur Løgmansskrivstovan svarað umboðsmanninum soleiðis:

"Víst verður til skriv tykkara, dagfest 20. november 2007, viðvíkjandi klagu frá A, dagfest 16. november 2007.

Sum tykkum kunnugt tók Løgmansskrivstovan málið upp til nýggja viðgerð, eftir at Umboðsmaðurin hevði gjørt sína niðurstøðu í sambandi við klaguna frá A til Umboðsmannin, dagfest 28. juni 2007.

Eftir at málið var viðgjørt av nýggjum við støði í niðurstøðu Umboðsmansins bleiv avgjørt at lata A innlit í nøkur skjøl afturat. Ivasamt er - eftir okkara fatan - um A hevði rætt til fult innlit í øll skjølini, ið hann fekk innlit í afturat, men lótu vit henda iva koma honum til góðar.

> Innlit bleiv kortini ikki latið í skjøl nr. 6, 7, 9, 11 og 14. Talan er um innanhýsis skjøl, sum klagarin, sambært § 7 í lógini um innlit, sum meginregla ikki hevur rætt til innlit í.
>
> Um klagarin, hóast hetta, skal kunna krevja innlit í hesi skjøl, skulu tey - ella upplýsingar í teimum - koma undir ásetingarnar í §§ 8 ella 11 í lógini um innlit.
>
> Sum áður fráboðað, meta vit ikki, at skjølini koma undir § 8. Í sambandi við § 8, nr. 3, kunnu vit leggja afturat, at eftir okkara fatan eru hesi skjøl ikki gjørd sambært notatskylduni, jb. § 6 í lógini um innlit. Tað vil siga, at tey ikki innihalda upplýsingar um veruligar umstøður av týdningi fyri málið, sum Løgmansskrivstovan hevur tikið ímóti munnliga - ella á annan hátt er vorðin kunnug um. Talan er hinvegin bert um skjøl, sum lýsa stig, sum eru tikin í málsviðgerðini, (skjøl nr. 6 og 9) ella skjøl, ið eru gjørd av øðrum ávum til egna nýtslu í viðgerðini av málinum (skjøl 7, 11 og 14).
>
> Heldur ikki meta vit, at skjølini innihalda upplýsingar um vanligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, og sum innlit tí kann krevjast í eftir § 11.
>
> Hetta er grundarlagið fyri avgerðini hjá Løgmansskrivstovuni. Hevur Umboðsmaðurin aðra áskoðan frætta vit fegin."

Við skrivi, dagfest 14. des. 2007, varð boðað pørtunum frá, at umboðsmaðurin ikki helt tað vera neyðugt við framhaldandi partshoyringum í hesum máli, og at umboðsmaðurin tí fór undir endaligu viðgerð sína.

**Niðurstøða**

Viðgerð mín av hesum máli snýr seg um, hvørt klagarin hevur fingið innlit í tey skjøl, sum hann sambært innlitslógini hevur rætt til at fáa innlit í.

Klagarin hevur fingið fult innlit í nøkur av skjølunum, hóast Løgmansskrivstovan sigur seg ivast í, hvørt klagarin hevði rætt til at fáa hesi skjøl.

Sambært § 4, stk. 1, 2. pkt. í innlitslógini kann ein myndugleiki geva innlit í størri mun, enn ásett er í lógini, um ikki annað fylgir av reglum um tagnarskyldu v.m. Hetta er tað sonevnda prinsippið um meirinnlit. Vísandi til hesa regluna og at Løgmansskrivstovan hevur givið klagaranum fult innlit í hesi skjølini, geri eg ikki meira við tann spurningin.

Eftir stendur spurningurin um rættin til innlit í tey skjølini, sum klagarin ikki hevur fingið, tvs. skjølini nr. 6, 7, 9, 11 og 14. Eg eri samd við Løgmansskrivstovuni í, at talan er um innanhýsis skjøl, sum eru fevnd av § 7 í innlitslógini. Hesi skjøl eru tí bert fevnd av rættinum til innlit, um talan er um skjøl, sum eru fevnd av § 8 í lógini, ella í tann mun, at tey innihalda upplýsingar av stórum týdningi fyri málið, jbr. § 11.

§§ 7, 8 og 11 í innlitslógini eru soljóðandi:

> "**§ 7.** Rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um innanhýsis arbeiðsskjøl. Innanhýsis arbeiðsskjøl eru
> 1) skjøl, sum verða gjørd av einum myndugleika til egna nýtslu,
> 2) brævaskifti millum ymiskar deildir innan fyri sama myndugleika og

3) brævaskifti millum eitt bý- ella bygdaráð og tess nevndir, deildir og aðrar stovnar ella millum hesar stovnar sínámillum.

**§ 8.** Rætturin til skjalainnlit fevnir hóast ásetingina í § 7 um innanhýsis arbeiðsskjøl, ið eru til skjals í endaligum líki, tá
1) skjølini bert endurgeva innihaldið av endaligu støðutakan myndugleikans viðvíkjandi avgerðini í einum máli,
2) skjølini bert innihalda eina endurgeving av upplýsingum, sum myndugleikin hevur havt skyldu til at skriva upp sambært ásetingini í § 6,
3) skjølini eru sjálvstøðug skjøl, ið eru gjørd av einum myndugleika fyri at fáa til vega prógvandi ella annan samsvarandi greidleika viðvíkjandi teim veruligu umstøðunum í einum máli, ella
4) skjølini innihalda almenn stevnumið fyri viðgerðini av ávísum málssløgum.

**§ 11.** Upplýsingar í skjølum, ið eru umfatað av § 7 og § 10, nr. 1-4, um veruligar umstøður, sum eru av stórum týdningi fyri málið, skulu hóast hesar ásetingar latast í samsvari við vanligu reglur lógarinnar.
..."

Eg eri samd við Løgmansskrivstovuni í, at skjølini nr. 6 og 9 hvørki koma undir §§ 8 ella 11, men einans lýsa stig, sum eru tikin í málsviðgerðini. Eg havi tí ongar viðmerkingar til, at innlit ikki er givið í hesi skjøl.

Innlit er givið í skjal nr. 8, sum er eitt upprit frá einari telefonsamrøðu millum løgmann og danska uttanríkisráðharran. Í hesum uppriti stendur, at løgmaður "helt seg til talubitar sínar dagfestar sama dag", tvs. skjal nr. 7.

Løgmansskrivstovan hevur ikki givið innlit í hetta skjal, vísandi til, at tað ikki inniheldur upplýsingar av stórum týdningi fyri málið. Eftir at hava gjøgnumgingið innihaldið í hesum skjali, havi eg ikki grundarlag fyri at finnast at hesari metingini hjá Løgmansskrivstovuni. Upplýsingarnar í skjalinum eru soleiðis háttaðar, at tær mugu sigast at vera politiskt argumenterandi, heldur enn upplýsingar um veruligar umstøður av stórum týdningi fyri málið.

Skjal nr. 11 er eitt upprit um týdningin av diplomatiskari umboðan, eins og ein lýsing av ymsu loysnunum. Skjal nr. 14 er eitt upprit, sum lýsir ymsar møguligar loysnir og kostnaðin av hesum. Spurningurin er tí, um hesi skjøl eru fevnd av § 8, nr. 3, og sostatt fevnd av innliti.

Tá ivamál eru, hvørt eitt skjal er fevnt av § 8, nr. 3 í innlitslógini, má avgerðin takast við støði í einari heildarmeting av innihaldinum og endamálinum við skjalinum, tvs. um skjalið er gjørt fyri at fáa til vega prógvandi ella annan samsvarandi greidleika viðvíkjandi teimum veruligu umstøðunum í málinum, ella um hetta er ætlað at vera grundarlag fyri innanhýsis støðutakanini hjá myndugleikanum.

Eftir at hava kannað hesi skjølini, eri eg samd við Løgmansskrivstovuni, at skjølini ikki eru fevnd av § 8, nr. 3.

Løgmansskrivstovan sigur viðvíkjandi skjali nr. 14, at hetta ikki inniheldur upplýsingar av stórum týdningi fyri málið. Uppritið umrøður sum áður nevnt

kostnaðin fyri ymsu loysnirnar, sum arbeitt var við. Tá hesar upplýsingar eru tiknar við í uppritið, er eftir øllum at døma talan um upplýsingar, sum í hvussu er hava havt ein ávísan týdning. Eg havi kortini ikki grundarlag fyri at finnast at metingini hjá Løgmansskrivstovuni um, at hetta ikki hevur havt stóran týdning fyri málið, og at hetta skjalið sostatt ikki er fevnt av § 11 í innlitslógini.

Samanumtikið havi eg ikki grundarlag fyri at finnast at hesari nýggju viðgerðini hjá Løgmansskrivstovuni av innlitsumbønini. Eg geri tí ikki meira við hetta málið.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður